Myndir: Jens Kristian Vang

# Elsti fimleikarin í felagnum

**78 ára gamli Hákun Mortensen er elsti limurin í Havnar Fimleikafelag, og hann er sannførdur um, at bæði ungdómur og eldri fólk gera gott av fimleiki. – Tey ungu spæla alt ov nógv bólt, heldur enn at gera fimleik, sigur hann**




Eirikur í Jákupsstovu



Hákun Mortensen er elsti limurin í Havnar Fimleikafelag

Í umleið 70 av teimum 100 árunum, Havnar Fimleikafelag hevur verið til, hevur Hákun Mortensen verið limur í felagnum.

– Tað er hopileyst at siga. Áramálið dugi eg ikki at siga, men vit hava gjørt hetta slagið av fimleiki í 30 ár, tvey kvøld um vikuna. Men nær eg byrjaði at gera fimleik, tað dugi eg ikki at siga. Eg havi altíð gjørt fimleik, sigur Hákun Mortensen

Til hátíðarløtuna í gjár vóru fleiri hundrað fólk í øllum aldri, tey yngru hevur Hákun eisini eina meining um.

– Eg haldi bara tað, at tað sum ofta er galið í skúlunum er at tey gera ov lítið av fimleiki. Tey spæla mest bólt. Tey hava nógvar góðar hallir, men tað verður ov nógv spælt, heldur eldri fimleikarin.

### Er væl fyri

Til upphitingin klokkan 17 á ovara vøllin í Gundadali smíltist Hákun Mortensen saman við øllum hinum.

– Fólk smílast, tí tey eru væl fyri. Eg eri ein maður, sum arbeiðir um dagin og geri fimleik um kvøldið, og tað er fínar greiðir. Tað skuldu øll byrjað uppá, heldur Hákun.

Hann sigur eisini, at tey bestu tingini við fimleikinum er venjingin, samanhaldið og veitslurnar.

### Eitt afturat

Hóast Hákun Mortensen er 78 ára gamal, so er hann sannførdur um, at hann tekur minst eitt ár afturat í fimleiki.

– Eg taki eitt afturat, og tað havi eg sagt í fleiri ár, sigur hann.

Og leggur afturat, at hann ikki kemur burturúr fimleikinum saman við eini 20 øðrum eldri monnum.



Tá alt var liðugt á ovara vølli í Gundadali varð marsjerað niðan í Høllina á Hálsi

## Føðingardagur við manér

Havnar Fimleikarfelag helt stóran føðingardag í gjár. Byrjað var longu klokkan 17 við upphiting á ovara vølli í Gundadali, har fleiri hundrað limir í felagnum hoppaðu, runnu, sveiggjaðu og streknu.

Síðan var felagsmynd tikin av limunum, sum fer í søgubøkurnar um tey, sum myndaðu felagið í 2009.

Somuleiðis vóru stórar ballónir senda upp í luftina, sum eldru menninir í felagnum sendu avstað.

Eftir hetta var stór skrúgonga niðan í høllina á Hálsi, har føðingardagurin helt fram við kakao, bollum, røðum og fimleiki.

Uppi í høllini beyð Anni Kyster, forkvinna í felagnum, fyrst vælkomin, áðrenn Sjúrður Johannesen, limur, røddi um sínar upplivingar í fimleiki.

Fimleikur varð eisini sýndur fram, og Jógvan Arge umrøddi bókina hjá Sámali T. F. Johansen um Havnar Fimleikafelag, sum høvundurin hevði greitt frá frammanundan.

Eitt sindur eftir klokkan 19 endaði føðingardagurin.

-eij

# Ongantíð havt so nógvar limir

**Á hundrað ára degnum eru umleið 1200 limir í Havnar Fimleikarfelag, og hetta er tað mesta nakrantíð. Anni Kyster, forkvinna, er sannførd um, at felagið hevur tað gott**




Eirikur í Jákupsstovu

– Tað sær út til at felagið er væl fyri. Vit eru umleið 1200 aktivir limir, og tað er nokk ikki hægri enn tað sama. Umstøðurnar verða betur og betur.

Fimi-høllin í Gundadali er á veg, so vit hava góðar vónir, sigur Anni Kyster.

Men í staðin fyri at fokusera upp á ytru virðini, so fer felagið nú at hyggja meira inneftir, og hetta merkir, at felagið fer at royna at útbúgva venjararnar meiri.

### Meiri breidd

Seinastu fáu árini hevur breiddin í felagnum fingið meira at fara til.

– Fimleikurin er fyri øll, og tí hava vit roynt at skipa soleiðis fyri, at breiddin fær meira enn tí árligu framsýningina. So vit hava gjørt nøkur tiltøk fyri breiddina, so tey hava fingið meira at gleða seg til.

Men kappingarliðini hava eisini fingið sítt, har tey nú sleppa út í heim at kappast ofta.



Stór felagsmynd varð í gjár tikin av limum í Havnar Fimleikafelag

Innan sjálvar greinirnar eru eisini stórar broytingar komnar.

– Amboðini eru blivin betri, og menningin, sum er í estetiska og amboðsfimleikinum er so øgilig í løtuni, greiðir forkvinnan hjá 100 ára føðingardagsbarninum.